# Kunnu við góðari samvitsku lata rækjuskipunum stuðul

**– Tað er lítið sum talar fyri, at ætlanin um stuðul til rækjuskipini er í stríð við altjóða lóg, sigur royndur sakførari**

STUÐUL TIL RÆKJUSKIP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Tað er neyvan í stríð við altjóða rætt at lata rækjuskipunum almennan stuðul, soleiðis sum samgongan hevur ætlað.

Tað sigur ein av okkara royndastu sakførarum, Halgir Winther Poulsen.

Ætlanin at lata rækjuskipunum stuðul dovnaði at kalla burtur, eftir tað kom fram, at hetta helst var í stríð við altjóða sáttmálar.

Hetta fekk felagið Rækjuskip at biðja løgfrøðingin gera eina meting av støðuni.

Og hansara niðurstøða er, at altjóða rættur kann neyvan brúkast sum ein forðing fyri at lata rækjuskipunum stuðul, soleiðis sum samgongan hevur ætlað.

Halgir Winther Poulsen sigur, at endamálið við ætlanini at geva rækjuskipunum stuðul, er at geva føroysku rækjuvinnuni andahjálp í eitt avmarkað tíðarskeið, meðan arbeitt verður við at bøta um veiðirættindi hjá vinnuni.

Ætlanin er at lata rækjuskipunum stuðul í tvey ár. Mett verður stuðulin fer at kosta einar 11 milliónir krónur í 2005. Av teimum kemur landskassin at bera einar 6,5 milliónir krónur og kommunurnar einar 4,5 milliónir.

– Tað er alment kent, at fiskivinnan sum heild verður munandi stuðlað í flest øllum londum, sum hava eina fiskivinnu av nøkrum týdningi. Hesin stuðul verður veittur á ymiskan hátt, t.d. beinleiðis studningur til reiðarí ella fiskiídnaðin sum heild, treytaður av útflutningstølum, flutning- og farmastuðul til útflutnings, undantøka ella afturbering av skatti og øðrum gjøldum, ávísir frádráttir av útreiðslum, ið beinleiðis hava samband við útflutning, ymiskar kreditskipanir, osfr, sigur sakførarin.

## Fleiri grundgevingar

Orsøkirnar til, at Halgir Winther Poulsen metir, at ætlaði rækjustuðulin neyvan er í stríð við altjóða sáttmálar, kunnu stutt samanfatast soleiðis:

– Stuðulin er ikki beinleiðis knýttur at útflutningsúrslitinum hjá rækjuflotanum. Harafturat kemur, at stuðulin í peningi og tíð er sera avmarkaður og at tey fimm skipini, ið eru eftir í føroyska rækjuflotanum, ikki fiska meiri enn fyri einar 30 milliónir krónur í part um árið, ella tilsamans fyri einar 150 millizónir.

– Príslegan á rækjum á altjóða marknaðinum er eitt úrslit av útboði og eftirspurningi. Ætlaði stuðulin til føroysku rækjuskipini er so lítil og so avmarkaður, at tað er ógvuliga lítið hugsandi, at hann hevur nakra ávirkan yvirhøvur á altjóða prísleguna av rækjum. Afturat hesum kemur at strandalondini og fiskivinnufelagsskapir seta TAC, ella hámark fyri, hvussu nógvar rækjur eiga at verða fiskaðar og eru føroysku rækjuskipini ikki í vinnuni, hevði veiðinøgd teirra bara verðið fiskað av øðrum, soleiðis at samlaða útboðið hevði verið tað sama.

Tað er sostatt torført at fáa eyga á, hvørja kappingaravlagandi ávirkan hesin studningur yvirhøvur kann fáa á altjóða rækjumarknaðin.

Og tað er eyðsæð, at tað, sum WTO fyrst og fremst setir seg ímóti, er útflutningsstuðul, ið hevur avlagandi ávirkan á kappingina millum tey londini.

– Støddin av afturberingini og treytirnar fyri útgjalding av studninginum eru greidliga orðað í lógini, ið sostatt er sera gjøgnumskygd. Hetta er eisini viðurskiftið, ið dentur verður lagdur á í sambandi við meting av, hvørt ein stuðul er »lógligur« ella ikki.

– Endamálið við ætlaðu lógini er ikki at veita útflutningsstuðul, og stuðulin er eiheldur treytaður av, at rækjurnar verða útfluttar.

– WTO sáttmálin letur tað upp í hendurnar á limalondunum at fylgja við, átala og prógva, um tey meta at nakað av londunum fremur kappingaravlagandi stuðul til vinnulív sítt.

– Tað er lítið hugsandi, at nakað annað land í WTO hevði kent seg gingnan so nær av einum so avmarkaðum stuðuli til ein part av føroyska fiskiflotanum, at viðkomandi sáttmálaland hevði ómakað sær at tala at, sigur Halgir Winther Poulsen.

## Fiskivinnan fær 80 -114 milliardir í stuðuli

Sambært frágreiðing frá nevndini sum hevur viðgjørt støðuna hjá rækjuskipunum, er samlaða altjóða veiðan av kaltvatnsrækjum vaksin nógv tey seinastu árini. Veiðan var í 1985 uml. 248.000 tons og í 2004 verður veiðan mett at fara at verða tilsamans uml. 420.000 tons.

Av hesi veiðu er føroyski parturin minkaður frá uml. 12.000 tonsum í 1985 til uml. 9.000 tons í 2004.

Hinvegin er veiðan hjá grannatjóðunum, Grønlandi og Kanada, vaksin munandi hetta tíðarskeið, hjá Grønlandi úr 54.000 tonsum í 1985 upp í 130.000 tons í 2004 og hjá Kanada úr 13.000 í 1985 upp í 140.000 tons í 2004.

Føroyski parturin av samlaðu alheims saltvatnsrækjuveiðuni í 2004 er sostatt uml. 2 %.

Mett verður, at samlaða árliga virðið av allari heimsins fiskiveiðu er uml. uml. 320 mia. kr. og at árligu stuðulsskipanirnar tilsamans útgera uml. 80-114 mia. kr, tvs. svarandi til uml. 25-30 % av samlaða veiðuvirðinum.

Tey lond, ið lata størsta stuðulin, eru Japan við uml. 11-17 mia kr. árliga, ES við uml. 10 mia kr. árliga, USA við uml. uml. 6 mia. kr. árliga og Rusland við uml 3,4 mia kr.

*Halgir Winther Poulsen í uppritinum um stuðul til rækjuskipini*

Løgmaður:

# Tað kann gerast ein trupulleiki

**– Okkara egna stýrisskipan forðar okkum í at seta eina lóg í gildi, sum stríðir ímóti altjóða sáttmálum og tí kann rækjustuðulin gerast ein trupulleiki, sigur Jóannes Eidesgaard**

STUÐUL TIL RÆKJUFLOTAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað er líka nógv okkara egna stýrisskipan sum er ein trupulleik, sigur løgmaður*

Ætlanin at veita rækjuflotanum stuðul, kann gerast ein trupulleiki.

Tað ásannar Jòannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann sigur, at tað er kanska ikki so nógv altjóða WTO-sáttmálin sum er ein trupulleiki.

– Tað er líka nógv okkara egna stýrisskipan, sum kann gerast ein stórur trupulleiki í hesum sambandi, sigur hann.

Løgmaður vísur á, at í okkara stýrisskipan stendur heilt greitt, at verður ein lóg sett í gildi í Føroyum, sum er í stríð við altjóða sáttmálar, sum Føroyar hava bundið seg til at halda, er hendan lóg ógildug.

– Sostatt er tað heilt greitt, at tað ber ikki til hjá okkum at seta eina stuðulsskipan í verk, sum stríðir ímóti altjóða sáttmálum.

Løgmaður sigur, at herfyri kom uttanlandsdeildin hjá løgmansskrivstovuni til ta niðurstøðu, at ætlaði rækjustuðulin er í stríð við altjóða sáttmálar.

Nú er ein løgfrøðingur hjá felagnum Rækjuskipum komin til eina aðra niðurstøðu og tað er, at talan neyvan er um brot á WTO–sáttmálan.

Løgmaður sigur, at nú er uttanlandsdeildin í ferð við at kannað niðurstøðuna hjá løgfrøðinginum hjá felagnum Rækjuskipum.

Tað arbeiðið er ikki liðugt enn.

Men løgmaður ásannar, at kemur uttanlandsdeildin framvegis til ta niðurstøðu, at talan er um brot á WTO-sáttmálan, verður tað ein trupulleiki, tí sum sagt forðar okkara stýrisskipan fyri, at vit seta eina lóg í gildi, sum er í stríð við altjóða sáttmálar, sum Føroyar hava bundið seg til at halda.






*Nýggja samgongan gleður seg at sleppa í gongd: Elin Lindenskov, Katrin Dahl Jacobsen, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir og Marin Katrina Frýdal.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Tað trýtur ikki við ætlanum

**Betri umstøður til ítrótt, fleiri ellis- og røktarheimspláss, skúlaútbyggingar og ein styrkt fyrisiting eru millum málini, sum komandi samgongan í Tórshavnar býráð hevur sett sær fyri**

NÝGGJ BÝRÁÐSSAMGONGA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin*

Tey gleða seg sum børn at sleppa í gongd. Heðin, Jógvan, Leivur, Elin, Marin Katrina, Hildur og Katrin. Tað trýtur heldur ikki við ætlanum, sum komandi samgongan í Tórshavnar býráð millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkurin hevur skotið út í kortið fyri tey komandi fýra árini.

Við undirheitinum "Nýggj kós-nýggur hugburður" hevði komandi samgonga í Tórshavnar býráð bjóðað til tíðindafund hósdagin, har hon legði framm, hvørji mál fara at seta dagsskránna í Tórshavnar kommunu komandi fýra árini.

## Dýrar ætlanir

Betri umstøður til ítrótt, fleiri ellis- og røktarheimspláss, parkeringskjallarar, betri umhvørvi, nýggir skúlar, ein meira framkomin brennistøð. Ja listin er langur av málum, sum nýggi býráðsmeirilutin hevur sett sær fyri, men ætlanirnar eru ikki heilt kostnaðarleysar.

Millum tungu íløgurnar kunnu nevnast nýggi skúlin í Hoyvík og ein brennistøð, sum skal lúka framkomin umhvørviskrøv. Hesar báðar íløgurnar liggja um 100 mió. krónurnar hvør. Hóast íløgukarmurin hjá Tórshavnar kommunu liggur um 90-100 mió. krónur árliga, so hevur samgongan kortini góðar vónir um at røkka hesum málum.

– Tú mást minnast, at politikkur snýr seg sanniliga um at seta sær langtíðarmál. Nøkur mál fara vit at klára í hesum valskeiðnum, meðan onnur verða vit við til at seta hol á, og sum fara at ganga inn í næsta valskeið. Eitt nú byggingin av nýggja skúlanum í Hoyvík fer at taka 6-7 ár, so vit megna ikki alt í hesum valskeiðnum, varð sagt á tíðindafundinum.

Spurd um tað kemur upp á tal at taka lán fyri at seta hesar ætlanir í verk, svaraði varaborgarstjórin, Jógvan Arge, at tað kom ikki upp á tal.

## Fyrisiting styrkast

Nýggja samgongan sigur seg leggja stóran dent á, at tað verður størri opinleiki í kommunalu fyrisitingini. Ætlanin er, at borgarstjórin skal halda eyga við, at kærur og umsóknir um alment innlit verða viðgjørdar og svaraðar rættstundis.

Samstundis ætlar samgongan at styrkja fyrisitingarliga førleikan, og hetta skal gerast við at seta ein løgfrøðing at menna løgfrøðiliga førleikan sum heild og í málsviðgerð.

Í løtuni starvast eingin løgfrøðingur í Tórshavnar býráð.

## Systkinaavsláttur

Í valstríðnum til kommunuvalið gjørdu fleiri valevnir vart við, at tørvur er á einum systkinaavslátturi í høvuðstaðarkommununi, tí kostnaðurin fyri eitt ansingarpláss er so høgur. Júst syskinaavlátturin er eitt øki, sum komandi samgonga raðfestir høgt. Ætlanin er, at foreldur at fleiri børnum, sum eru á ansingarstovni, skulu fáa 25% avsláttur frá nummar tvey barni.

Prísurin fyri at fáa eitt barn ansað í høvuðsstaðarkommununi í dag liggur um 1500 krónur.

## Oyggjaleikir aftur til Føroya

Hildur Eyðunsdóttir verður nýggi formaðurin í mentanarnevndini, og á tíðindafundinum kom framm, at Tórshavnar kommuna ætlar at leggja nógv fyri at fáa Oyggjarleikirnar aftur til Føroya.

Tað eru sløk 15 ár síðan, at Oyggjaleikirnir vórðu hildnir í Føroyum, og síðan hava røddir javnan verið frammi um, at tað kundi verið áhugavert at hýst leikunum aftur. Ein høvuðstrupuleiki hevur verið, at karmarnir til serliga frælsan ítrótt og fimleik ikki hava verið nøktandi fyri at skipa fyri leikunum, men hesum trupulleika ætlar komandi samgonga at koma til lívs.

Komandi formaðurin í mentanarnevndini, Hildur Eyðunsdóttir, segði at hon væntaði, at karmarnir til hýsa oyggjaleikunum aftur í Føroyum koma upp á pláss komandi valskeiðið, og skuldi verið lag á manni søkt um fáa Oyggjaleikirnar aftur til Føroya.

### FAKTA

**Samgongan í Tórshavnar Býráð 2004-2008**

**Borgarstjóri:** Heðin Mortensen
**Varaborgarstjóri:** Jógvan Arge

**Formansessir:**
**Fíggjarnevndin:** Heðin Mortensen
**Sosialanevnd:** Katrin Dahl Jakobsen
**Umhvørvi og heilsunevndin:** Elin Lindenskov
**Byggi- og býarsamskipannevndin:**Jógvan Arge
**Tekniskanevnd:** Marin Katrina Frýdal
**Mentanarnevnd:** Hildur Eyðunsdóttir
**Havnarnevnd:** Leivur Hansen

## Edvard Munch til Føroya

Á fundi í Norðurlandaráðnum herfyri var gjørt av, at ein framsýning av málningum hjá kenda norska málaranum, Edvard Munch, verður í Føroyum komandi ár. Tað er ikki greitt enn, nær í komandi ári, at framsýningin verður.

Norðurlandaráðið játtaði á fundinum 7 mió. krónur til ymiskar norðurlendskar mentanarverkætlanir, og nakað av hesum peningi er falli føroyingum í lut.

## Trúboðari vitjar Eysturoynna

Í døgunum 27. november til 5. desember vitjar frítíðartrúboðarin Asger Jensen frá Hasle á Bornholm Eysturoynna, har hann heldur møtir, bíbliutímar og ungdómsmøti.

Asger er førddur og uppvaksin á Bornholm, og hevur tað mesta av sínum lívi arbeitt sum frítíðartrúboðari fyri Luther Missiónsforening á Bornholm. Fyri nøkrum árum síðan varð hann pensioneraður, og hann hevur nýtt mesta partin av tíðini at ferðast í Danmark og Norra, har hann hevur hildið møtir og onnur tiltøk.

Bygdirnar, sum Asger kemur at vitja verða: Skála, Gøta, Oyndarfjørður og Hellurnar.

## Skótahjálpin letur 100.000 krónur

Tað er ikki hissini úrslit, sum Skótahjálpin í ár hevur fingið. Í døgunum 19. til 26. september megnaðu skótarnir at savna í alt 133.468 krónur. 100.000 krónur av hesari upphædd fara óskerdir til tvær verkætlanir.

Skótahjálpin hevur gjørt av, at "Sjálvhjálparbólkar fyri børn og ung, ið hava mist foreldur við deyða" skal fáa 50.000 krónur, meðan 50.000 krónur fara til hjálpararbeiðið hjá Tito Esquerra biskuppi, ið hann ger millum børn í Kolumbia.